# Starvslýsingar




á portal.fo

**Kostnaður:** (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

**Kostnaður:** (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

SEA-STAR

# Skrivstovufólk

Vegna økt virksemið verður hervið søkt eftir einum fólki til skrivstovu okkara at arbeiða fulla tíð. Møguliga kann talan blíva um skrivstovulærupláss, og í so fall, má umsøkjari hava HH ella FHS prógv.

Umsøkjarar við skrivstovuútbúgving og/ella royndum innan skrivstovuyrki hava fyrimun.

**Høvuðsuppgávurnar vera:**
- Bókhald
- Lønaravgreiðslur
- Og annað sum hoyrir skrivstovuyrkinum til

Til tíðir kann nógv vera at gera, so tí má umsøkjarin tola at arbeiða uttanfyri arbeiðstíð, um tað gerst neyðugt.

Ynskt verður, at tú byrjar skjótast gjørligt, men vit eru tó til reiðar at bíða eftir rætta umsøkjaranum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Jan Danielsen, stjóra á tlf. 44 99 77 ella 74 99 77. Til ber eisini at senda teldupost til jandan@post.olivant.fo

Heldur tú at hetta er nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við avritum av prógvum og viðmælum í seinasta lagi 22. juni 2007 til:

**SEA-STAR Contractors Spf.**
Heiðavegur 72, Box 220
FO-610 Saltangará
Viðmerk: “umsókn um skrivstovustarv”

**SEA-STAR Contractors** Spf. er eitt av nýggjaru byggifeløgunum í Føroyum. Vit hava uml. 40 fólk í starvi. Í løtuni hava hava vit nøkur byggiarbeiðir í Grønlandi, og nøkur í Føroyum. Eisini reka vit ein persónbilaverkstað. Afturat tí hava vit eitt felag, sum burturav tekur sær av kavaraarbeiði. Skrivstova okkara er í leigaðum hølum í Saltangará, men vit eru ígongd við at byggja bygning á Toftum, og tá hann er liðugur um vónandi eitt hálvt ár, verður skrivstovan flutt á Toftir.

TVØROYRAR KOMMUNA

# SØKT VERÐUR EFTIR STARVSFÓLKUM

## TIL FRÍTÍÐARSKÚLAN Í TRONGISVÁGI

Av tí at vit fara at víðka um okkara frítíðarskúla, koma vit at hava brúk fyri fleiri starvsfólkum.

**Stovnslýsing:**
Frítíðarskúlin er normeraður til 40 børn í 1. 2. og 3. flokki. Hildið verður til í hølunum hjá Trongisvágs Skúla.

**Størvini:**
Talan er um 2 pedagogstørv á 25 t. um vikuna, og eitt starv sum stuðul 15 t. um vikuna. Arbeiðstíðin kemur at liggja ímillum kl. 11.00-17.30. Størvini verða sett 16.08.07.

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur góð samstarvsevnir og ert álítandi
- At tú tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- At tú vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- At tú ert nærløgd/lagdur og vírsir umsorgan
- At tú ert kreativ/ur
- At tú vísir áhuga og ynskir at mennast í arbeiðinum
- At tú ert opin fyri broytingum
- At tær dámar at gera brúk av nærumhvørvinum

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um pedagogar ikki fáast til størvini, verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað ístaðin.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jeanette Joensen, virkandi leiðara, á tlf. 372750.

**Umsókn:**
Saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum skulu vera Frítíðarskúlanum, FO-826 Trongisvágur í hendi í seinasta lagi 29.06.07.

# FORELDRAFUNDUR í Mentanarhúsinumtý. 19. juni kl. 19.30

**Skrá**

1. Kunning um roykipolitikkin hjá Fuglafjarðar kommunu. Formaðurin í Sosialu nevnd greiðir frá.
2. Reglugerð skúlans um royking frá august 2007. Skúlastjórin og skúlastýrisformaðurin greiða frá.
3. Ymiskt

**Skúlastýrið og Fuglafjarðar skúli**

# Leiðari til Musikkskúlan í Suðuroy

Musikkskúlin í Suðuroy søkir eftir leiðara.

**Musikkskúlin væntar at umsøkjarar skulu:**
- hava kunnleika til musikkskúlaarbeiði
- vera kveikjandi
- duga at skipa fyri
- hava góð samstarvsevni

Setanartíðarskeið: 1. august 2007 – 31. juli 2009

Løn eftir avtalu, ið skal góðkennast sambært § 5 stk. 5 í kommunustýrislógini.

Umsóknarfreist: 2. juli 2007

Musikkskúlin í Suðuroy er partur av føroysku musikkskúlaskipanini.

Umsókn skal sendast til:

**Musikkskúlin í Suðuroy**
v/Elin Nielsen · 870 Fámjin

FK í Hoyvík

FK í Hoyvík sóknast eftir

# 2 fólkum at gera pizza

**at byrja mánadagin 2. juli**

**Arbeiðstíðin verður hvønn mánadag frá klokkan 15.30 og 2 - 3 tímar fram. Tú ert millum 14 og 17 ár**

**Nærri fæst at vita við at venda sær til slaktaran, Lars Hansen, tel 314149**

**FK Hoyvík**
**Brekkutúni 9**
**FO 188 Hoyvík**
**att: Lars Hansen**

fk